gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Gløgga útvarpstólið

**Trupulleikin við útvarpinum og fartelefonum er nakað, sum flestir bilførarar í dag kenna til, men nú skuldi ein forkunnug loysn verið at hóma**

BILAR
*Heri á Rógvi*

Hesar dagar, tá annar hvør óviti rennur runt við einari fartelefon í lummanum, so uppstanda eisini nakrir nýggir samfelagsligir trupulleikar. Trupulleikar, sum vit kanska ikki kundu havt ímyndað okkum fyri bert fáum árum síðani. Fleiri av hesum átrokandi dilemmaunum snúgva seg um fartelefonir.

Hesin nýmótans hentleiki hevur við árunum sett fleiri og fleiri krøv til okkum nýtarar, um vit skulu kunna fáa mest møguliga gleði burturúr. Fyri fáum árum síðani varð tað lógarkravt, at skuldi tú tosa í fartelefon meðan koyrt varð, so var neyðugt at skipa soleiðis fyri, at tú onkursvegna kundi tosa uttan at nýta hendurnar. Úrslitið var, at nógv »hands-free« sett sóu dagsins ljós. Útvarpstólið ella bilstereoannleggið órógvaði tó framvegis samrøðurnar, og framleiðararnir løgdu høvur í blot fyri at finna eina líkinda loysn. Nú hevur onkur funnið upp á ráð, sum skuldi riggað til eitthvørt útvarpstól.

## Mutar

Tólið, sum kann vísa seg at gerast banin hjá hesari nýmótans høvuðpínuni, eitur “Auto-Mute”. Talan er um eitt lítið tól, ið syrgir fyri, at tosað kann verða í fartelefon uttan at verið órógvaður av útvarpinum.

Alt eftir hvørja íbinding tú velur, so vil útvarpstólið sjálvt »muta«, t. e. sløkt verður fyri ljóðinum, ella verður streymurin tikin av. Úrslitið er í báðum førum, at fartelefonsamskifti kann fara fram uttan nakað órógv.

Sambært Jens Mortani Rasmussen, sum starvast hjá Radiobúðini í Runavík, so er fyrimunurin við hesum tólinum, at tað kann setast til øll útvarpstól, og Auto-Mute fangar sjálvt signalið, soleiðis at skilja, at tað er líkamikið, hvør telefon ringir ella um vibrator funktiónin er frá.

– Tað eru nógvir fyrimunir við at velja hesa loysnina, sigur Jens Mortan Rasmussen.

Tíggju sekund eftir, at samrøðan er liðug, so slær sjálv “mutingin” frá.



*Tólið, sum kann vísa seg at gerast banin hjá hesari nýmótans høvuðpínuni – at útvarpstólið órógvar okkum, tá vit tosa í fartelefon – eitur »Auto-Mute«. Talan er um eitt lítið tól, ið syrgir fyri, at tosað kann verða í fartelefon uttan at verið órógvaður av útvarpinum*

## Potens forleingjari

Sjálvur sigur Jens Mortan Rasmussen, at hann ikki selur bilradio, men heldur bilstereo.

– Tað skal vera talan um gott ljóð fyrst og fremst, tá tað snýr seg um bilstereo, sigur Jens Mortan Rasmussen.

Til eitt rættiligt bilstereo skal nógv gott til. Talan skal bæði vera um forsterkara, hátalarar og sjálvan spælaran, sum oftast er gjørdur til fløgur.

Jens Mortan Rasmussen sigur, at tað fyrst og fremst eru ungir menn, sum ogna sær tílíkan útbúnað.

– Talan er í roynd og veru um ein potensforleingjara, og verður útbúnaðurin ofta keyptur fyri at imponera diddurnar, sigur Jens Mortan Rasmussen.




# Saab flutt inn til Opel

**Síðani seinasta leygardag er tað P/F Meinhardt Arge í Havn, sum selur Saab í Føroyum**

BILASØLA
*Eirikur Lindenskov*

P/F Meinhardt Arge í Havn selir nú fýra bilmerki: Nissan, Peugeot, Opel – og síðani seinasta leygardag eisini Saab.

Orsøkin til hetta er, at General Motors fyri tveimum árum síðani keypti svensku Saab-verksmiðjuna. Av somu orsøk eru fleiri Saab og Opel-umboð løgd saman, og var tað eisini tað sum hendi í Føroyum 1. september.

Seinastu seks árini hevur Sp/F John P. Vilhelm selt Saab í Føroyum, og mongu árini framman undan honum var tað Tummas Ørv, ið hevði Saab-umboðið í Føroyum.

Í fyrstu syftu flytir Saab-umboðið inn í kjallarahæddina í bygninginum hjá P/F Meinhardt Arge við Oyggjarvegin, og verður tað framhaldandi John Vilhelm sjálvur, sum fer at standa fyri søluni av Saabbilunum.



*John P. VIlhelm og Finnbogi Arge góvu hvør øðrum hond upp á samstarv, nú P/F Meinhardt Arge tekur yvir Saab-umboðið í Føroyum. Millum teirra stendur Opelstjórin í Danmark, Klaus Kibsgaard*

Tá P/F Meinhardt Arge yvirtók Saab-umboðið, yvirtók felagið samstundis goymsluna hjá John P. Vilhelm eins og starvsfólkini.

Í sambandi við samanleggingina vóru fyrisitingarstjórin hjá Opel Danmark, Klaus Kibsgaard, og sølustjórin, Thomas Bruun, í Føroyum.

Opel Danmark, sum frá 1. oktober aftur fer at eita General Motors Danmark, umboðar merkini Opel, Cadillac, Chevrolet og nú eisini Saab.

Klaus Kibsgaard segði tá við Sosialin, at teir halda tað vera skilagott at leggja umboðini av teirra bilmerkjum saman. Hann vísti eisini á, at tað er ein fyrimunur í Føroyum at hava fleiri bilmerki undir sama taki – eisini hóast hetta vóru bilmerki, ið kappast.

– Sjálvandi vilja vit hava, at bilmerkini hava hvør sín samleika, og at tað skal verða kundanum púra greitt, hvussu hann kemur í sambandi við Opel- ella Saab-umboðið, segði Klaus Kibsgaard.

– Vit síggja eisini stórdriftsfyrimunirnar á umvælingar, viðlíkahalds- og goymslusíðuni. Við at hava fleiri bilmerki undir sama taki ber til at fáa meira burturúr – bæði hjá fyritøkuni P/F Meinhardt Arge – men ikki minst fyri kundan, segði stjórin hjá Opel Danmark, Klaus Kibsgaard.

gult15 cyan15 magenta15 svart15



Tórshavnar Trafikkskúli:

# Fyrimunir við samstarvi

**Tórshavnar Trafikkskúli er ein koyriskúli, sum hevur fimm koyrilærarar knýttar at sær. Hetta er ein stórur fyrimunur, sigur Hans J. Hermansen, sum er ein av koyrilærarunum í trafikkskúlanum**

KOYRISKÚLI
*Stefan í Skorini*

Tórshavnar Trafikkskúli er eitt samtak millum fimm koyrilærarar. Hesir arbeiða saman við at veita næmingunum, sum vilja sita við róðrið, hollan kunnleika til øll ferðsluviðurskifti.

– Tað er ein stórur fyrimunur at arbeiða saman, sum vit gera nú. Undirvísingin verður nógv effektivari, og vit eru betur førir fyri at taka okkum av næmingunum, tí arbeiðsbyrðan er lættari at bera, sigur Hans J. Hermansen, sum hevur verið koyrilærari í seks ár.

Teir fimm koyrilærararnir, sum eru knýttir at koyriskúlanum, eru Óli Jacobsen, Mogens Wraae, Edvin Poulsen, J. P. Koyriskúlin og Hans J. Hermansen.

– Allir lærararnir eru samdir um, at hetta samtakið er ein stórur fyrimunur fyri okkum allar, sigur Hans J. Hermansen, ið er ábyrgdarhavandi á skúlanum.

## Øll koyrikort

Tórshavnar Trafikkskúli veitir øll koyrikort, sum eru at fáa, uttan teldukoyrikortið! Umframt øll koyrikortini frá motorsúkklu til trailara, so kunnu teir eisini geva koyrikort til trukk og krana. At taka hesi koyrikortini snýr seg mest um teori, men eisini nakrar praktiskar royndir.

Teir fimm lærararnir skiftast um at skipa fyri undirvísingini, so sum tað passar.



*Tórshavnar Trafikkskúli er úrslit av einum samtaki millum fimm koyrilærarar, og at vera saman er ein stórur fyrimunur fyri allar lærararnar, heldur Hans J. Hermansen, ábyrgdarhavandi* Mynd: Álvur Haraldsen

At taka teori til vanligt persónbilakoyrikort tekur einar seks vikur, og næmingarnir hava tilsamans 40 tímar í undirvísing.

Hans J. Hermansen sigur, at ein týðandi partur av undirvísingini er at fyrireika næmingin mentalt til at klára seg í ferðsluni uttan at vera til ampa fyri onnur.

– Tað er umráðandi, at næmingurin hevur rættan hugburð til ferðsluviðurskifti, tá hann fer út í ferðsluna, og tí royna vit at fyrireika næmingin á rættan hátt, sigur Hans J.

Skúlin skal geva næminginum ein ávísan førleika við bili, kunnleika til ferðsluviðurskifti og tann rætta hugburðin. Hesum roynir Tórshavnar Trafikkskúli at syrgja fyri.

